# Havnarmenn renna frá hinum

**Úrslitini í vikuskiftinum førdu við sær, at oddaliðið úr Havn nú er tvey stig fremst. Vestmenningar anda tó eitt sindur havnarmonnum í nakkan, nú kappingin er komin í helvt**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*




*Í drúgvum talvi eydnaðist tað Olaf Berg úr Havn at basa Ólavi Simonsen*

Undan fimta umfarinum, høvdu havnarmenn 11,5 stig, meðan einastu veruligu kappingarneytarnir, vestmenningar, høvdu eitt stig færri, 10,5. Vestmenningar vónaðu, at klaksvíkingar fóru at gera ein vørr móti havnarmonnum. Men so varð ikki.

### Stórsigur

Tað gekk ikki long tíð áðrenn havnarmenn høvdu eina 2-0 leiðslu. Feðgarnir, Andrias og Helgi D. Ziska, vunnu á ávíkavist Tummas Martini Sólsker og Willa Olsen. Andrias fekk longu í byrjanarspælinum greiðan fyrimun, meðan Helgi vann spakuliga sítt talv. Helgi er toppskorari á liðnum við 4,5 av 5. Andrias hevur eisini megnaúrslit at vísa á við sínum 3,5 stigum av 4 møguligum.

Helgi endaði við 5,5 stigum av 10 møguligum í Hastings. Við úrslitinum vinnur Helgi sær umleið 30 ratingstig. Andrias vinnur sær eisini fitt av rating fyri síni 3 stig.

Aftur til dystin sunnudagin. Olaf Berg og Ólavur telvdu eitt heldur longri talv, men eisini á 2. borði lá havnarmaðurin omaná. Olaf, sum telvaði trygt og sannførandi ímóti Ólavi, hevur seinastu árini verið álitið hjá havnarmonnum í liðkappingini. Í ár hevur tað eisini gingið væl hjá honum, nú kappingin er komin í helvt. Olaf hevur 4 stig av 5 møguligum.

Talvið á 1. borði endaði við javnleiki. Eyðun Nolsøe, sum styrkti um klaksvíksliðið, hevði eitt ávíst drúgvt trýst á Martini Poulsen, men føroyameistarin frá 2003 og 2004 helt skansan og fekk sín javnleik.

Eitt óføra gott úrslit hjá oddaliðnum. Klaksvíkingar tykjast hinvegin við vissu at vera uttanfyri dystin um gullið.

### Óvæntað vend í kollafirði

Vestmenningar manglaðu sterkasta korti í dystinum ímóti kollfirðingum. John Rødgaard var staddur uttanlands. Heldur ikki lá tað fyri hjá Sjúrði Thorsteinsson, sum vanliga mannar 4. borð, at telva sunnudagin.

Torbjørn Thomsen fekk á 2. borði nokkso skjótt greiðan fyrimun ímóti Samson Højgaard. Torbjørn kombineraði seg til tryggan sigur.

Næsta talvið sum varð liðugt, var millum Hans Kristian Simonsen og Carl Eli N. Samuelsen. Hans Kristian, sum hevði svart, kom nakað betur frá byrjanarspælinum, men í miðspælinum eydnaðist tað Carl Eli at lumpa Hans Kristian og vinna sær ein riddara fyri finnu. Hans Kristian fekk mótspæl, men tað varð ikki nóg mikið fyri at bjarga sær.

Útlit vóru fyri at kollfirðingar í minsta lagi fóru at fáa 2-2. Men vestmenningurin Jákup á Rógvu Andreasen fekk hjálp frá mótstøðumanninum Bernhardi Thomsen í javnari støðu og so varð liðugt. Eisini Karl Louis Johansen á 4. borði hevði ávísan fyrimun í endatalvinum ímóti John Jacobsen, men John helt høvdið kalt og fekk avviklað til javnleik.

Tískil endaði dysturin við teprum sigri til vestmenningar, sum harvið hanga so frægt teir kunnu í havnarmonnum.

### Javnleikur í Klaksvík

B-liðið hjá klaksvíkingum í 1. deild fekk sunnudagin ein kærkomnan javnleik ímóti hvalvíkingum.

Útisetin Terji Petersen vann ímóti Haldur Suna Johansen. Haldur yvirspældi helst eina javna støðu. Rani Nolsøe hevði fyrimun í sínum talvi ímóti Finnbjørn Zachariassen, men samanrenningin av einum skeivum leiki hjá Rana og mótspæli hjá Finnbirni, koppaði skálin hin vegin.

Martin Brekká vann rímiliga trygt á Ingolf Gaard á 3. borði, meðan Rógvi Dragaberg bjargaði klaksvíkingum javnleikin við sínum sigri á Sámali Christiansen á 4. borði.

Komandi sunnudag hittast klaksvíksliðini ímóti hvørjum øðrum, hvalvíkingar skulu til Vestmanna og havnarmenn fáa vitjan av kollfirðingum.

Í 2. deild er elevatorliðið úr Sandavági fremst við 14 stigum. Teimum næstir er Havnin 3 við 11 stigum.

**Úrslit og støður - 1. deild**
**5. umfar**

| | |
|---|---|
| Havnin-Klaksvík 1 | 3,5-0,5 |
| Martin Poulsen-Eyðun Nolsøe | 0,5-0,5 |
| Olaf Berg-Ólavur Simonsen | 1-0 |
| Helgi D. Ziska-Wille Olsen | 1-0 |
| Andrias Ziska-Tummas Martin Sólsker | 1-0 |
| Kollafjørður-Vestmanna | 1,5-2,5 |
| Hans Kristian Simonsen-Carl Eli Nolsøe Samuelsen | 0-1 |
| Torbjørn Thomsen-Samson Højgaard | 1-0 |
| Bernhard Thomsen-Jákup á Rógvi Andreasen | 0-1 |
| Karl Louis Johansen-John Jacobsen | 0,5-0,5 |
| Klaksvík 2-Hvalvík | 2-2 |
| Terji Petersen-Haldur Suni Johansen | 1-0 |
| Rani Nolsøe-Finnbjørn Zachariassen | 0-1 |
| Ingolf Gaard-Martin Brekká | 0-1 |
| Rógvi Dragaberg-Sámal Christiansen | 1-0 |

**Støðan**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Havnin | 15,0 |
| 2 | Vestmanna | 13,0 |
| 3 | Klaksvík 1 | 8,5 |
| 4 | Hvalvík | 8,5 |
| 5 | Kollafjørður | 8,0 |
| 6 | Klaksvík | 7,0 |

**2. deild - 5. umfar**

| | |
|---|---|
| Havnin 3-Vestmanna | 2,5-1,5 |
| Sandavágur-Gøta 4-0 | |
| Toftir-Havnin | 2-2 |

**Støðan**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Sandavágur | 14,0 |
| 2 | Havnin 3 | 11,0 |
| 3 | Havnin 2 | 10,5 |
| 4 | Toftir | 10,5 |
| 5 | Vestmanna 2 | 9,5 |
| 6 | Gøta | 4,5 |

Tjaldur-VÍF 27-29 (15-12):

# Tjaldur beit frá sær

**VÍF-kvinnurnar fingu eina óvæntaða harða uppgávu, tá tær í dag vitjaðu í Runavík**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tjaldur tykist ikki hava hug at geva skarvin yvir, nú endaspælið í Sunset-kappingini er farið ígongd.

Í dag tóku tær móti VÍF, sum verður mett sum sterkasta liðið í niðara bólkinum, men hetta legði Tjaldur ikki stórvegis í.

Fyrstu løtuna leyp heimaliðið upp á 8-2, og tó at VÍF stríddi seg aftur, so hevði Tjaldur munin í steðginum.

Eftir steðgin leikaði meira javnt á, men 10 minuttir fyri leiklok fekk VÍF tó lagt seg á odda. Tað endaði eisini við, at gestirnir fingu ætlaðu stigini, men Tjaldur fekk avgjørt nýtt høvið til at senda eina kraftiga ávaring til hini liðini í niðara Sunset-bólkinum.

Vit hava tíverri ikki móttikið dómaraseðilin frá dystinum.

# HM-gøla í Trinidad & Tobago

Áhugin fyri HM-fótbólti er sjálvandi ovurstórur í Trinidad & Tobago, nú landið fyri fyrstu ferð hevur vunnið seg fram til endaspælið.

Tí hevur eftirspurningurin eftir ferðum og atgongumerkjum verið stórur, men nú er ein sonn gøla komin undan kavi.

Varaforsetin í FIFA, JAck Warner, eigur nevnliga eina ferðaskrivstovu í landinum, og har verða atgongumerki til endaspælið seld fyri ovurhonds stórar upphæddir. Miðalinntøkan í landinum er 65.000 um árið, men kortini kosta 12 dagar í Týsklandi við HM-fótbólti heilar 29.500 kr.

Forsetin í landinum, Patrick Manning, hevur lovað, at stjórnin nú fer at kanna eftir, hvussu atgongumerkir og ferðir til Týsklands verða seld.

**-mørk**

---

# Vieri vil skifta felag

Varaforsetin í AC Milan, Adriano Galliani, sigur í dag við italskar fjømiðlar, at framherjin Christian Vieri ynskir at sleppa úr felagnum.

Í summar verður HM í Týsklandi, og italski framherjin ber ótta fyri at vantandi spælitíðin í AC Milan hevur við sær, at hann fær tað torført við at vinna sær eitt pláss í HM-hópin hjá Italia.

Fleiri feløg hav sýnt Christian Vieri áhugað. Millum hesi eru Atletico Madrid, Newcastle United og Tottenham Hotspurs.

**-páll**

---

# Romario tekur eitt ár í senn

Nógv kann sigast um Romario, men hann hevur ongantíð verið typan, sum hevur runnið sólina svarta á vøllinum.

Kanska er hetta eisini orsøkin til, at skjótt 40 ára gomlu fótbóltsbeinini framvegis halda á at skjóta mál - nógv mál.

Í fjørð skeyt rutineraði málrevurin 22 mál í brasilsku kappingini og varð soleiðis toppskjútti. Og nú sigur hann seg vera til reiðar at taka enn eitt ár.

Og aftur í ár fer hann at spæla fyri Vasco da Gama. Gitt varð annars, at Romario fór at skifta til meistarnar úr Corinthians, um hann helt fram.

Romario byrjaði yrkisleið sína í Vasco da Gama. Eftir at hann endaði europeiska ævintýr sítt, spældi hann eitt skifti í Fluminese, men hetta gekk alt annað enn væl.

**-mørk**

---

# Anja Andersen skal venja Serbia

Tá Serbia tekur ímóti Rumenia í tveimum EM-undankappingardystum í mai mánaða, verður tað við fyrrverandi stórspælaranum á danska landsliðnum og núverandi venjaranum hjá Slagelse, Anju Andersen, við róðrið.

Anja Andersen hevur játtað, í fyrsta lagið, at standa á odda fyri serbiska landsliðnum í tveir dystir. Eftir dystirnar í mai skulu Serbiska hondbóltssambandi og Anja Andersen tosa saman aftur um eitt møguligt longri samstarv.

Við Ritzau sigur Anja Andersen:

– Eg havi sagt ja til tilboðið, tí eg síggi stórar møguleika í serbiskum hondbólti, og tí eg síggi møguleikar fyri at vinna gull í teimum stóru kappingunum.

Anja Andersen heldur kortini eisini fram sum venjar hjá Slagelse IF.

**-páll**